UTTAN ÚR HEIMI

## Friðaruppskot vrakað

Eitt uppskot, sum skuldi fáa enda á bardøgunum í Irak, og sum Saudiarabia legði fram, er vrakað. Amerikanska stjórnin vil ikki góðtaka tað.

Fleiri arabisk lond hava seinastu dagarnar arbeitt fyri at fáa enda á krígnum í Irak, eftir at uttanríkisráðharrarnir í Arabisku Samgonguni á einum felags fundi mótmæltu álopinum hjá amerikanarum og bretum. Teir kravdu eisini, at álopið skuldi steðga beinanvegin.

Uppskotið, sum amerikanska stjórnin hevur vrakað, hevði Saudiarabia gjørt. Jordanski kongurin, Abdullah, hevur eisini arbeitt við einari friðarætlan saman við egyptiska forsetanum, Hosni Mubarak, og konginum í Bahrein, Hamad. Jordanski uttanríkisráðharrin segði í gjár, at uppskotið hjá kongi er ikki liðugt, men at tað ætlandi verður lagt fyri hinar arabisku stjórnirnar fyrsta dagin.

## Eingi skip eftir oljuni

Hóast kríggið pumpa irakar framvegis nógva olju ígjøgnum rørleiðingarnar til Turkalands. Har plaga tangaskip at ferma oljuna í býnum Ceyhan, men í gjár lá einki tangaskip og tók ímóti iraksku oljuni.

Hetta kemst av, at reiðaríini eru í iva, hvørt tey hava loyvi at ferma iraksku oljuna ella ikki. ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, hevur sagt, at Irak hevur loyvi at selja eina avmarkaða nøgd av olju, treytað av, at inntøkan verður nýtt til mat og heilivág.

Seinasta hálva annað árið hevur Irak útflutt 1,7 milliónir tunnu av olju um dagin, men síðani USA og Bretland lupu á landið, er útflutningurin minkaður burtur í einki. Hildið verður, at útflutningurin nú liggur um 170.000 tunnur um dagin.

## Bush fekk ein frammaná

George W. Bush, forseti fekk ein rættiligan frammaná, tá senatið fyrrakvøldið skerdi skattalættan, sum forsetin hevði lovað amerikansku skattgjaldarunum. Bush lovaði herfyri amerikanarunum næstan 5.000 milliardir krónur í skattalætta næstu tíggju árini, men senatið skarvaði 2.000 milliardir burtur av uppskoti forsetans.

Tað vóru demokratarnir, sum skutu upp at skarva av uppskotinum hjá forsetanum. Einsamallir kundu teir ikki fáa broytingina ígjøgnum, tí teir eru í minniluta, men tá atkvøtt varð, atkvøddu tríggir av teimum republikansku floksfeløgunum hjá Bush saman við demokratunum.

Undir orðaskiftinum vístu demokratisku senatorarnir á, at tað er púra burturvið at játta 5.000 milliardir krónur í skattalætta, samstundis sum alt fleiri pengar skulu játtast til kríggið í Irak. Tí hendan rokningin verður stór. Bara tað næsta hálvárið skal stjórnin nýta 550 milliardir krónur til Irak-átakið.

## ICC fingið høvuðsákæra

Argentinski løgfrøðingurin Luis Moreno Ocampo er tilnevndur høvuðsákæri við tann nýskipaða revsidómstólin í Haag. Hann varð tilnevndur aftan á drúgvar tingingar um onnur uppskot. Millum teirra, sum eisini vóru í uppskoti, var høvuðsákæran við tann serliga Jugoslavia-dómstólin, Carla del Ponte.

Luis Moreno Ocampo hevði ein virknan lut í arbeiðinum, tá leiðararnir í fyrrverandi argentinska hernaðarstýrinum komu fyri rættin har í áttatiárunum. Hann hevur egið sakføraravirki í Buenos Aires, men er eisini knýttur at lærda Harvard-háskúlanum í USA.

Tann 11. mars vórðu teir 18 dómararnir við altjóða revsirættin tiknir í eið, og formaður er kanadiski dómarin Phillipe Kirsch. Higartil hava 89 lond staðfest sáttmálan um altjóða revsirættin. Men fleiri lond vilja ikki viðurkenna hann, teirra millum USA, Russland og Kina.

# Heldur Saddam enn Bush



**Irakar, sum flýddu undan stýrinum hjá Saddam Hussein, fara nú aftur til Irak at stríðast - ikki ímóti Saddam men Bush.**

KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen:*

Irakska sendistovan í jordanska høvuðsstaðnum Amman hevur havt úr at gera seinastu dagarnar við at lata útlagnum irakum innferðarloyvi til Irak. Vesturlendskir tíðindamenn í Amman siga, at fleiri túsund irakar eru farnir heimaftur hesar dagarnar. Bara mánadagin avgreiddi sendistovan 3.000 innferðarloyvi.

Irakararnir, sum nú fara heimaftur, flýddu í síni tíð undan stýrinum hjá Saddam Hussein, men nú fara teir heimaftur at stríðast - ikki ímóti stýrinum í Bagdad, men ímóti amerikansku og bretsku hermonnunum.

Við vesturlendskar fjølmiðlar siga irakararnir, at teir hava ikki álit á amerikanarunum og George W. Bush, forseta, og teir líta ikki á orð forsetans um, at hansara einasta mál er at beina fyri hópoyðingarvápnum og at koyra Saddam Hussein frá. Tað er irakska oljan, amerikanararnir vilja hava, siga irakararnir. Skulu teir velja ímillum Saddam og Bush, velja teir tann fyrra.

### USA hevur skyldina

Ein av teimum vesturlendsku tíðindamonnunum í Amman, norðmaðurin John Hultgren, skrivar í blaðnum Aftenposten, at irakar geva amerikanarunum skyldina av, at Irak er vorðið eitt menningarland eftir tólv ár við handilsforðingum. Hetta hevur eisini gjørt, at nógv fleiri irakar styðja Saddam Hussein nú enn fyrr. Teir eru eisini sannførdir um, at Irak gjørdi tað, sum gerast kundi, fyri at sleppa undan kríggi, men at amerikanarar kortini leyp á landið. Tí kemur tað als ikki óvart á teir útlagnu irakararnar í Jordan, at teir landsmenn seta seg upp ímóti amerikansku hermonnunum.

- Bumbur gera ikki mun á vini og fíggginda ella sivilum og herfólki. Tann, sum bumbar teg, er fíggindi tín, sigur Ahmed Jabouri við Aftenposten.

- Irakar eru illir, svangir og kringsettir. Saddam Hussein er eitt spøkilsi. Hann er allastaðni og ongastaðni. Er málið hjá amerikanarunum at koyra Saddam Hussein frá, hví gjørdu teir tað so ikki, tá teir sóu, hvussu irakar liðu undir handilstiltøkunum? Sjálvt menn, sum hava góða útbúgving, forvinna ikki nóg mikið í Irak til at breyðføða konu og børn og nóg illa til flutning til og frá arbeiði. Hetta er tað, sum vit hava fingið frá amerikanarunum, sigur Jabouri.

# Funnu vápn á sjúkrahúsi

**Amerikanskir herflotamenn fingu ein hvøkk, tá teir tóku sjúkrahúsið í irakska býnum Nassiriya. Har vóru eingir sjúklingar, men vápn og lóður.**

KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen:*

Amerikanska herleiðslan í Qatar heldur, at irakar hava nýtt sjúkrahúsið sum venjingarstøð hjá hermonnum, samstundis sum tað hevur verið sjúkrahús.

Tá amerikansku herflotamenninir komu inn á sjúkrahúsið, sóu teir ongan sjúkling. Men í ymsum hølum funnu hermenninir 200 ymisk vápn, eina rúgvu av lóðuri, 300 trygdarbúnar og einar 300 gassmaskur. Í og kring sjúkrahúsið tóku amerikanararnir einar 170 óvápnaðar irakskar hermenn, sigur herleiðslan í Qatar.

Sum skilst hevur tað ørkymlað herleiðsluna, at hermenninir funnu trygdarbúnar og gassmaskur á sjúkrahúsinum. Amerikanararnir halda hetta vera eina ábending um, at irakar í hvussu er hava umhugsað at nýta evnafrøðilig vápn í krígnum.

ítróttur

Nr. 60 • hósdagur • 27. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo



# Frálík svimjiúrslit í Køge Open

**Seytjan ára gomul bólkamet vórðu tikin í Køge um vikuskiftið. Andrass Thomsen setti eisini nýtt føroyskt met í 200 metrar frí**

SVIMJING
*Páll Holm Johannesen*



Seinasta vikuskiftið kappaðust 35 føroyskir svimjarar í Køge Open. Hetta er annað árið á rað, at føroyingar er í millum luttakararnir í donsku kappingini. Samanborið við í fjør vóru úrslitini væl betur í ár. Í alt eydnaðist føroyingum at vinna 52 heiðursmerkir. Samlaða heiðursmerkjatalið hjá føroyingum gav eitt samlað triðja pláss í kappingini, og tað má sigast at vera eitt frálíkt úrslit.

### 10 svimjarar av ungdómslandsliðnum

Ferðaliðið fór av landinum týsdagin í farnu viku, og lagt varð út við eini venjingarlegu. Venjingarlegan var til fríggjadagin, tá kappingarnar byrjaðu. Kappast var frá fríggjadegi til sunnudag. Í fjør vóru bert tríggir føroyskir luttakarar, men í ár valdi Svimjisambandið at leggja meira fyri og sendi heilar 35 svimjarar avstað. Fyri fleiri av svimjarunum var Køge Open liður í fyrireikingunum til oyggjaleikirnar. Landsliðsvenjarin, Petur Heðin á Fløtti, hevði eisini valt at lata 10 svimjarar av ungdómslandsliðnum at sleppa at royna seg ímillum tey eldru.

– Vit hava havt lyndi til at dusa okkum í góðu úrslitunum hjá teimum eldru, og gloymt tað næsta ættarliðið. Luttøkan hjá teimum yngru í kappingini er liður byggja nakað nýtt upp. Hetta var eisini ein frálíkur møguleiki hjá teimum yngri at merkja til tað, hvussu tað er vera á landsliðnum, tí fleiri teirra fara óiva at vera har um nøkur ár, greiðir Petur Heðin á Fløtti frá.

Kappingin í Køge varð býtt í fýra bólkar: Seniorar, juniorar, ung, yngst. 32 svimjifeløg vóru við og umframt føroyingar, so vóru eisini fýra feløg úr Svøríki. Í alt vóru 700 svimjarar, og tá seinasta startskotið var farið sunnudagin, høvdu heili 3100 startir verið yvir vikuskiftið.

Eftir kappingina sunnudagin vórðu bestu svimjararnir kosnir, og heldur ikki her vóru føroysku svimjararnir við skerdan lut. Elspa Mørkøre varð kosin til besta svimjara í kappingini fyri tey yngstu, og sama heiðurin fekk Malan Michelsen fekk í bólkinum fyri ung. Bæði Malan Michelsen og Elspa Mørkøre er ung stjørnuskot í føroyskari svimjing, og svimjikøn siga seg vænta nógv frá teimum báðum í framtíðini.



### Tvey 17 ára gomul met tikin

Mest óvæntaðu úrslitini í Køge um vikuskiftið, stóðu Erling Jacobsen og Malan Michelsen fyri. Bæði settu nýtt bólkamet í bólki trý. Felags fyri hesi bólka-metini er, at tey eru heili seytjan ára gomul. 29 november 1986 settu Sørin Olsen úr Ægir og Anita Ryggshamar úr Vágs Svimjifelag bólkamet í bólki 3, men leygardagin í Køge vórðu bæði hesi met langt um leingi tikin. Eitt føroyskt met var eisini sett í Danmark, og var tað Andrass Thomsen, sum setti nýtt met í 200 metrar frí.

### Vælnøgdur landsliðsvenjari

Ferðaliðið kom heimaftur mánadagin, og týsdagin fingu vit orðið á landsliðsvenjaran, Petur Heðin á Fløtti. Hann var sum vera man væl hýrdur, segði seg vera púra tiknan av bóli yvir góðu úrslitini um vikuskiftið.

– Tað gekk heilt ótrúliga væl og nógv betur enn væntað. Vit vunnu eitt ótal av heiðursmerkjum, so eg eri ótrúliga væl nøgdur, sigur Petur Heðin á Fløtti.

Petur Heðin vísur á, at tað var rætt at taka tey ungu við, og at tey stóðu seg frágera væl í kappingini. Landsliðsvenjarin heldur at støðið í ár var hægri enn í fjør, og tað ger ikki úrslitini verri, greiðir hann frá.

Um fjúrtan dagar verður SUM í Vági, og um fýra vikur verður endaliga úttøkukappingin til oyggjaleikirnar. Petur Heðin sigur at í løtuni eru eini fimm svimjarar, ið liggja á markinum fyri at røkka kravtíðir til oyggjaleikirnar, og tað verður spennandi um, hesi fara at røkka neyðugu kravtíðunum.

**Samlað úrslit av kappingini varð:**

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| Elspa Mørkøre | 7 | 2 | 1 |
| Hanus Eysturdal | 3 | 2 | 1 |
| Jákup Øssursson Mohr | 3 | 1 | 2 |
| Malan Michelsen | 5 | 3 | 2 |
| Andrass Thomsen | 1 | 3 | |
| Jóannes á Fløtti | 3 | | |
| Janus Olsen | | 4 | |
| Kirstian Olsen | 1 | | |
| Benthe Andersen | 1 | | 2 |
| Lisbeth Joensen | | | 2 |
| Nathalia Reinhart | | | 1 |
| Føroyar Stafett gentur | | | 1 |
| Føroyar Stafett dreingir | | | 1 |
| Alt í alt: | 24 | 15 | 13 |